

# STATUS

*September 2010 – 1. útg.*

LANDSVERK
*byggir land*




> „Í eini roynd at betra um tænastuna og kostnaðarminimera umsitingina vil Landsverk við hesum blaði gera eina roynd at upplýsa politikarar og aðrar áhugabólkar um sjónarmiðini hjá stovninum og tað sum hann fæst við“

> „Hetta merkir, at talið av fulltíðarsettum starvsfólkum seinastu 20 árini er minkað úr 500 niður í 129, svarandi til góð 74 prosent“

# TÍ EITT BLAÐ FRÁ LANDSVERKI




Oyvindur Brimnes, stjóri
**Landsverk**


**So hvørt samfelagið hevur ment seg til eitt vitanar- ella upplýsingar-samfelag, er tørvurin á kunning og samskifti vaksin samsvarandi. Opinleiki og gjøgnumskygni er í dag vorðið eitt beinleiðis krav, og tí mugu ráð, stovnar og aðrar almennar fyrisitingar tillaga seg til at virka í hesum veruleika**

At kunning nú er ein beinleiðis tænasta til borgaran í breiðastu merking, er bæði tíðar- og orku-krevjandi og kostar tí ikki so lítið. Hinvegin kann vantandi kunning í dagsins samfelagi í síðsta enda verða uppaftur meira kostnaðar-mikið, tí borgarin hevur krav á vitan.

Nógv dømi eru um viðurskifti, sum ein borgari ikki hevur kunnleika um, ikki hevur skilt ella hevur skeiva fatan av, og sum krevur drúgva viðgerð, tíð og pening, áðrenn viðkomandi hevur fingið at vita tað, ið ynskiligt er. Eisini eru nógv dømi um, at skeiv vitan ferðast millum fólk, har tað ofta krevur enn meiri viðgerð, tíð og pening, áðrenn rætta myndin er komin fram.

Vit skulu bara nakrar fáar mánaðir aftur í tíðina fyri at finna eitt dømi um, at partar av byggivinnuni góvu almenninginum ta skeivu fatan, at meðan privatu veitararnir í byggivinnuni vórðu noyddir at skerja sítt virksemi og siga fólki úr starvi, so gjørdi Landsverk tað øvugta. Nevniliga setti nýggj starvsfólk. Nú er tað einaferð soleiðis, at starvsfólk koma og fara, men sum á einumhvørjum øðrum arbeiðsplássi, so hevur á Landsverki bert verið talan um at seta nýggj starvsfólk, tá onnur eru farin úr starvi.

Sæð yvir tíð hevur talan verið um sera umfatandi skerjingar á Landsverki seinnu árini. Høvuðs-orsøkin er, at stovnurin hevur útlisiterað størsta partin av virkseminum. Hetta merkir, at talið av fulltíðarsettum starvsfólkum seinastu 20 árini er minkað úr 500 niður í 129, svarandi til góð 74 prosent. Við øðrum orðum eru bert ein stívur fjórðingur eftir av teimum starvsfólkum, sum stovnurin hevði fyri umleið 20 árum síðani. Bara seinasta góða árið eru 15 fulltíðarsett starvsfólk, ið svarar til meir enn 10. hvørt fólk, farin úr starvi.

Orsøkin til manglandi vitanina í samfelagnum er í stóran mun tann, at almennu myndugleikarnir ikki megna at nøkta tørvin á upplýsing. At skeivar upplýsingar spjaða seg út í samfelagið er í mongum førum úrslit av gitingum ella tilvitað villeiðing frá einstaklingum ella áhugabólkum. Hetta er partur av lobbyvirksemi fyri ella ímóti einum ávísum máli. Tá ikki alt gongur eftir ætlan hjá ávísum pørtum, veksur áhugin hjá teimum fyri tilvitaðari villeiðing.

Felagseyðkennið fyri ófullfíggjað ella óneyv tíðindi kann sammetast við dømið í ævintýrinum hjá H. C. Andersen um vælkendu fjøðurina, ið gjørdist til fleiri høsn. Jú, longri søgan er farin av sporinum, tess torførari og kostnaðarmiklari er tað at fáa rætta boðskapin fram.

Avleiðingarnar av manglandi vitan ella beinleiðis villeiðing eru í flestu førum drúgt og rættiliga umfatandi arbeiði hjá ráðum og stovnum at skera inn til kjarnuna og sannleikan í einum máli.

Ikki er óvanligt, at áhugabólkar ella einstaklingar venda sær til landstýrisfólk, sum krevur eitt formligt og tíðarkrevjandi arbeiði fyri einum svari, ið landsstýrisfólkið skal hava, tá eitt mál verður kannað.

Aloftast fara fyrispurningarnir til landstýrisfólkið umvegis løgtingsfólk sum munnligir, skriftligir ella §52 fyrispurningar. Í slíkum førum er málsviðgerðin enn meira formlig, og bæði ráð og stovnar nýta nógva tíð og orku til at svara formliga rætt, og hetta er sjálvandi sera kostnaðarmikið.

Í eini roynd at betra um tænastuna og kostnaðarminimera umsitingina vil Landsverk við hesum blaði gera eina roynd at upplýsa politikarar og aðrar áhugabólkar um sjónarmiðini hjá stovninum og tað sum hann fæst við. Hetta fyri at spara tíð, orku og pening samfelagnum at gagni.




# STØÐAN Í VERKÆTLANUM BEINT NÚ

**Hóast sparingar og munandi minni virksemi, so eru framvegis nógvar verkætlanir í gongd, ið Landsverk varðar av sum byggiharri. Niðanfyri verða hesar verkætlanir stutt umrøddar hvør sær. Kostnaður og játtanir eru lýstar í yvirlitinum"Støddin á verkætlanum"**

## Umvælingar í Tinganesi

Umvælingin, sum verandi játtan er til, var liðug í august. Talan er um Skansapakkhúsið, ið er tað ytsta húsið, har Løgmanskrivstovan heldur til, og Salurin, sum er íbundin her. Talan hevur í stóran mun verið um uttandura arbeiði við at umvæla og partvís skifta klædning, vindeygu og bjálving. Hetta arbeiðið byrjaði í fjør og er ein partur av eini størri ætlaðari umvæling fyri allar bygningarnar í Tinganesi, ið tørv hava á hesum.

## Landssjúkrahúsið

Arbeiðið við B-bygninginum á Landssjúkrahúsinum, sum er tann høgi bygningurin, er liðugt og avhendað. Talan er um høvuðs-umvæling av bygninginum uttan við einum sonevndum klimaskermi. Hetta fevnir um nýggjan klædning, nýggj vindeygu og bjálving. Viðvíkjandi tí nýggja H-bygninginum, sum ætlandi skuldi byggjast omaneftir, er ongin politisk avgerð tikin enn. Málið viðvíkjandi nýggjari verklagslóg liggur sostatt hjá politisku myndugleikunum at taka støðu til. Umbyggingin av Eygnadeildini í sambandi við rúm til skanningar hevur gingið eftir ætlan og er liðug. Somuleiðis hava tær smærru verkætlanirnar á Lands-sjúkrahúsinumgingið eftir ætlan. Fyri øll arbeiði á Lands-sjúkrahúsinum er galdandi, at tíðar-ætlanin heldur, men at játtanin neyvan verður nýtt í ár, tí støða ikki er tikin til H-bygningin.

## Økisdepil í Vági fyri sinnisveik

Tíðarætlanin heldur, og stovnurin, sum verður bygdur saman við nýggja Ellis- og Røktarheiminum, skal verða liðugur í mars næsta ár. Bygningurin er innilokaður, og málaraarbeiðið innan er byrjað. Økis-depilin fer at húsast í niðastu hædd-ini, meðan Ellis- og Røktarheimið, sum tær fýra syðstu kommunurnar í Suðuroy í felag fíggja, fer at halda til í teimum báðum ovaru hæddunum. Í einum síðubygningi verða bygdar 10 íbúðir til sinnisveik.

## Autistaheimið Kelduskákið í Klaksvík

Er liðugt. Manglar eru gjørdir í ár fyri 400.000 krónur. Játtanin heldur.

## Sambýli í Havn

Játtaðar eru 16 mió. krónur í 2010, men tað er ein politiskur iva-spurningur, hvussu sambýlið skal formast, og hvar tað skal leggjast. Tískil er arbeiðið ikki byrjað enn.

## Studentaskúlin í Hoydølum

Í sambandi við hølistrupulleikar í Hoydølum var gjørt av at gera eina fyribils lon við 10 skúlastovum, ið hava eina samlaða vídd á 816 fermetrar. Arbeiðið gekk bæði skjótt og væl, og 30. august fluttu næmingarnir inn í nýggju skúla-lonina, sum liggur eystan fyri sjálvan skúlan. Somuleiðis eru gjørdar umvælingar inni í skúlanum, har millum annað trupulleikar vóru við vánaligari inniluft. Øll arbeiði hava gingið eftir ætlan, eins og kostnað-urin er innan fyri játtanarkarmin.

## Skúladepilin í Marknagili

Skipanaruppskotið, har tey ymsu krøvini verða staðfest og funksjón-irnar fastlagdar, er fyri kortum av-hendað Mentamálaráðnum. Næsta stigið verður at tilevna eitt pro-sjektuppskot. Prosjekteringin skal eftir ætlan verða liðug móti sumri næsta ár. Tá hetta er gjørt, verður útbjóðingartilfarið gjørt og byggiuppgávan bjóðað út. Prosjekteringin gongur eftir ætlan, og sjálv byggingin fer væntandi í gongd á heysti 2011. Treytað av at játtanartilgongdin heldur, verður Skúladepilin klárur at taka ímóti næmingum í august 2014.

## Umvæling av almennum bygningum

Játtanin til viðlíkahald av almennum bygninum upp á 15,9 mió. krónur netto verður nýtt upp á eitt hav av bygningum. Tað veri seg skúlar, søvn, sjúkrahús, ellis- og røktarheim, prestagarðar, aðalráð og nógvar aðrar stovnar. Eins og í sambandi við aðrar verkætlanir er neyv stýring á bæði játtanarkarmi og tíðarætlan, sum heldur í báðum førum. Játtanin er tó undir helmingin av tørvinum á umvælingum.

## Ítróttarhøll í Sandoy

Kommunurnar áttu upprunaliga prosjektuppskotið, sum orsakað av ov stórari fíggjarligari byrðu fyri kommunurnar var gjørt um til eina landsuppgávu. Uppskotið varð síðani endurskoðað og broytt nakað. Skipanaruppskot við krøvum og funksjónum er tilevnað og góðkent av bygginevndini. Síðani verður prosjekteringsarbeiðið gjørt liðugt, og miðað verður ímóti at bjóða jørðarbeiðið út í oktober í ár. Restin av arbeiðinum er tengt at, hvussu ein møgulig játtan á fíggjarlógini fyri 2011 fer at síggja út. Sambært verklagslógini verður samlaði kostnaðurin fyri ítróttarhøllina 27 mió. krónur.

## Suðuroyar Sjúkrahús

Landsverk yvirtók prosjektleiðsluna frá Suðuroyar Sjúkrahúsi í fjør. Starvsfólkabygningurin, sum er í trimum hæddum, er nú umvældur og umbygdur. Meginparturin innan er rivið niður og bygt uppaftur. Íbúðirnar vóru ótíðarhóskandi og eru gjørdar størri. Fyrsta byggistig, ið fevndi um helvtina av miðhæddini og ovastu hædd, varð liðugt í mai. Annað byggistig fevnir um kjallaran, men hesin partur er treytaður av at nýggjari játtan á fíggjarlógini.

## Arbeiði við vegakervinum í Kalsoynni

Játtanin fyri 2010 til trygdararbeiði í tunlunum í Kallsoynni er um at vera brúkt, og tí er arbeiðið við skróting steðgað restina av árinum. Tað verður tó í løtuni arbeitt við at seta upp neyðljós og brandskáp, sum skulu verða klár í september. Byrjað hevur verið í tí norðasta av teimum fýra tunlunum, Trøllanestunlinum, har umleið ein triðingur av skrótingini er fingin frá hondini.

## Dagføring av vegum, tunlum og brúm

Orsakað av manglandi viðlíkahaldi ígjøgnum mong ár, er peningur játtaður til ábøtur í sambandi við tað stóra forfallið, sum vegakervið er í. Í mun til forfallið, er játtanin bert ein brotpartur av tørvinum, men hetta er ein byrjan og hevur gingið eftir ætlan í ár.

## Hovstunnilin

Leingjan av portalinum øravíkar-megin er liðug. Arbeiðið rundan um sjálvan tunnilsmunnan heldur fram í næstum. Hendan uppgávan snýr seg um at planera og gera betringar á ljósskipanina. Eftir ætlan skal alt arbeiðið verða liðugt síðst í september.

## Brúgvin um Streymin

Arbeiðið við at høvuðsumvæla brúnna er nú komið so væl áleiðis, at eftir er bert at leggja asfaltslitlag á koyribreytina og heingja upp eina gongubrúgv á norðaru síðu. Gongubrúgvin verður í løtuni gjørd á skipasmiðjuni MEST í Havn, og verður væntandi klár til at seta upp í oktober. Høvuðsumvælingin av brúnni hevur fevnt um at skifta út koyribreytina, fuktbjálva, nýtt asfalt og, sum áður nevnt, at gera nýggja gongubrúgv, ið er skild burtur frá koyribreytini. Frammanundan var ein smøl gongubreyt í báðum síðum á koyribreytini.

### Rituvíkarvegurin

Arbeitt verður á Rituvíkarhálsi við at binda Æðuvíkarvegin og vegin fram við Toftavatni í nýggja teinin á Rituvíkarvegnum. Tá hetta er liðugt, er stívliga helvtin av samlaða arbeiðinum við nýggja vegnum gjørt. Av tí at ongin verklagslóg fyriliggur, hevur verið neyðugt at steðga, meðan arbeiðið er bjóðað út av nýggjum frá ári til árs. Annars gongur arbeiðið eftir ætlan.

### Leirvíkarvegurin

Broytt verklagslóg var samtykt áðrenn summarfrítíðina, og Eystur-kommuna hevur fingið uppskot til avtalu millum Landsverk og kommununa til góðkenningar· Eitt samtak millum byggifeløgini JHR Entreprenørar og RTS Contractors átti lægsta tilboðið, og sáttmála-samráðingar eru tiknar upp við hesar entreprenørarnar. Arbeiðið við nýggja Leirvíkarvegnum fer at taka umleið hálvtannað ár.

### Havnin í Skúvoy

Arbeitt hevur verið við at umvæla molan, sum fekk stóran brimskaða. Hóast tarnað av nógvum brimi og vánaligum veðri, hildu bæði tíðar-ætlan og kostnaðarætlanin, sum var upp á umleið 1,0 mió. krónur. Arbeiðið var avhendað 20. juli 2010, hóast ikki alt var heilt liðugt tá.

### Trygdartiltøk

Eins og í grannalondum er játtan til trygdartiltøk ein afturvendandi játtan á fíggjarlógini. Árligi tørvurin liggur á umleið 8,3 mió. krónum, meðan játtanin í ár er upp á 3,0 mió. krónur. Við støði í hesum ger Landsverk raðfestingar út frá, hvar tørvurin á trygdartiltøkum er størstur. Arbeiðini ganga eftir ætlan.

### Útoyggjastuðul

Ymsar ábøtur á vegakerv og havnarløg í Fugloy, Svínoy, Kallsoy, Mykinesi og í Skúvoy. Í Stóru Dímun er stuðul latin til liðugtgerð av einum sláturhúsi.

## STØDDIN Á VERKÆTLANUM

**Umvælingar í Tinganesi**
Játtan 2010: 4.300.000
Kostnaðarmeting: 44.000.000

**Landssjúkrahúsið**
Játtan 2010: 29.000.000
Kostnaðarmeting: er tengt at, hvat verður tikið við.

**Økisdepil í Vági fyri sinnisveik**
Játtan 2010: 15.800.000
Kostnaðarmeting: 32.600.000

**Autistaheimið Kelduskákið í Klaksvík**
Játtan 2010: 400.000
Kostnaðarmeting: 11.800.000

**Sambýlið í Havn**
Játtan 2010: 16.000.000
Kostnaðarmeting: ógreitt

**Studentarskúlin í Hoydølum**
Játtan 2010: 6.500.000
Kostnaðarmeting: ikki mett

**Skúladepilin í Marknagili**
Játtan 2010: 23.000.000
Kostnaðarmeting: 391.000.000

**Umvæling av almennum bygningum**
Játtan 2010: 17.000.000
Eykajáttan: -2.100.000
Kostnaðarmeting: 32.000.000 árliga

**Ítróttarhøll í Sandoy**
Játtan 2010: 10.000.000
Eykajáttan: -8.000.000
Kostnaðarmeting: 27.000.000

**Suðuroyar Sjúkrahús**
Játtan 2010: 2.500.000
Kostnaðarmeting: 6.650.000

**Arbeiði við vegakervinum í Kalsoynni**
Játtan 2010: 2.500.000
Kostnaðarmeting: 23.500.00

**Dagføring av vegum, tunlum og brúm**
Játtan 2010: 2.000.000
Kostnaðarmeting: 377.000.000

**Hovstunnilin**
Játtan 2010: 2.700.000
Kostnaðarmeting: 150.000.000

**Brúgvin um Streymin**
Játtan 2010: 7.000.000
Kostnaðarmeting: 14.000.000

**Rituvíkarvegurin**
Játtan 2010: 3.500.000
Kostnaðarmeting: 14.000.000

**Leirvíksvegurin**
Játtan 2010: 3.000.000
Kostnaðarmeting: 45.000.000

**Havnin í Skúvoy**
Játtan 2010: 2.000.000
Eykajáttan: -900.000
Kostnaðarmeting: 1.100.000

**Trygdartiltøk**
Játtan 2010: 3.000.000
Kostnaðarmeting: 8.500.000 árliga

**Útoyggjastuðul**
Játtan 2010: 3.100.000
Kostnaðarmeting: ikki ásett





# SPENNANDI SAMSTARV UM SKÚLADEPIL

**At fyrireika eina stóra byggiverkætlan tekur oftani longri tíð á tekniborðinum enn at byggja. Og tá talan er um størstu byggiverkætlan í Føroyum í nýggjari tíð, so skulu nógvir endar knýtast saman, áðrenn farast kann undir sjálva bygginga**

Á ovastu hædd í bygninginum hjá Skilling í Bøkjarabrekku við frálíkum útsýni oman yvir miðbýin og niðaneftir, situr ein danskur arkitektur og stríðist við at knýta allar endar og kantar saman, áðrenn klárt verður at seta spakan í jørðina fyri nýggja Skúladeplinum við Marknagil. Ein byggiverkætlan, ið hvat bygging viðvíkur, er nógv tann størsta byggiætlan í nýggjari føroyskari byggisøgu.

Finn Nørkjær er arkitektur og partnari í ungu og viðurkendu arkitektafyritøkuni, BIG Bjarke Ingels Group, sum júst nú er tað heitasta arkitektanavnið í Danmark. Fyritøkan hevur vunnið fleiri virðislønir fyri teirra bygningar, ið ein fyri og annar eftir skjóta seg upp í londum sum USA og Kina, eins og í Danmark og nógvum øðrum evropeiskum londum.

Tað var í desember, at ein dóms-nevnd valdi Team Fuglark við føroysku Fuglark og danska Bjarke Ingels Group, sum høvuðsráðgeva at tekna skúladepilin við Marknagil. Í dómsnevndini sótu umboð fyri Mentamálaráðið, Landsverk, ein uttanhýsis fakdómari og leiðslunar á Tekniska Skúla í Havn, Handils-skúlanum og á Føroya Studenta-skúla, ið eru teir skúlarnir, ið koma at húsast í nýggja skúladeplinum.

Hóast hetta ikki er tann størsta byggiuppgávan, sum BIG er farin undir, so er hon sera áhugaverd, heldur danski arkitekturin.

- At gera ein skúla er sjálvandi heilt øðrvísi enn til dømis at gera ein íbúðarblokk ella ein skrivstovu-bygning, tí her eru so nógvar funktiónir, sum skulu spæla saman og nøkta bæði tann yvirskipaða tørvin og hvørt einstakt endamál.

Soleiðis sigur Finn Nørkjær, ið var settur sum prosjekteringsleiðari 1. mai í ár, tá hann saman við familjuni – konuni og tveimum døtrum – flutti til Føroya.

Hann rósar samstarvinum við Landsverk og allar hinar partarnar í verkætlanini og kallar samstarvið frálíkt og fyrimyndarligt.

- Tað kann gott vera, at tingini skulu vendast einaferð eyka heruppi og tí ikki altíð ganga við teirri ferð, sum eg kundi hugsað mær, men kortini haldi eg, at samstarvið hevur gingið avbera væl, sigur Finn Nørkjær.

## Stórur áhugi úti í heimi

Í sambandi við eina so stóra uppgávu, koyra nógv ting parallelt, og tí má tungan haldast mitt í munninum fyri ikki at missa yvirlitið.

- Mín leiklutur er at stýra tíðini og syrgja fyri at binda teir ymsu endarnar saman, sigur Finn Nørkjær. Eisini toghaldarin á Landsverki, sum er byggiharri fyri verkætlanini, Karl Jakob Ósá, letur væl at samstarvinum við BIG og Fuglark.

- Mær dámar væl stórar avbjóðingar, og at samstarva við ein so stóran útbjóðara er ótrúliga spennandi og avbjóðandi. Samstarvið hevur gingið avbera væl, sigur Karl Jakob Ósá, verkætlanarleiðari. Áhugin fyri hesi stóru bygginginI hevur ikki bara verið stórur í Føroyum, men so sanniliga eisini aðrastaðni. Tað gongur valla dagur, at ikki onkur danskur, norskur, týskur ella íslendskur veitari vendir sær til Finn Nørkjær fyri at lodda dýpið um onkursvegna at sleppa upp í part í verkætlanini

- Kreppan og niðurgongdin í byggivinnuni er positiv á tann hátt, at tað ber til at velja teir bestu veitararnar á øllum økjum. At tað mesta harafturat er munandi bíligari í niðurgangstíðum, er tann stóri síðuvinningurin, sigur Finn Nørkjær. Í skrivandi løtu er okkurt umleið ein triðingur av verkætlanini fingin frá hondini. Komandi tríggjar mánaðarnar verður arbeitt við at gera prosjekteringsuppskot, og uppundir jól verður umsókn um byggiloyvi send Tórshavnar kommunu.

Eftir ætlan skal Skúladepilin við Marknagil verða liðugur á sumri 2014.

### Um Skúladepilin

*Stødd: 19.486 fermetrar*
*Kostnaður: 391 mió. krónur*
*Byggiharri: Landsverk.*

Eini 20 fólk arbeiða burturav við at tekna og samskipa prosjekteringsarbeiðið. Toymið av fyritøkum, ið hava fingið litið tekning og prosjektering upp í hendur, eru hesi: Fuglark, BIG Bjarke Ingels Group, Lemming & Eriksson, Sámal Johannesen, Martin E. Leo og KJ Elráð. Í grundgevingini fyri at velja toymið Fuglark legði dómsnevndin dent á, "at toymið í allari tilgongdini hevur sýnt ein megnar vilja og eitt vælorðað arbeiði við uppskotinum og sniðgevingini av hugskotinum. Uppskotið livir á ein sannførandi hátt upp til tað høga støðið, ið varð sett fyri uppgávuni."

Visjónin fyri skúladepilin er millum annað, at hann skal vera eitt stað, "har opinleiki demokrati, fakleiki, almenn siðmenning, nýhugsan og námsfrøðilig nýmenning eru sjónlig. Bygningurin skal geva møguleikar fyri at skapa undirvísingina kreativt, nýhugsandi og slóðbrótandi bæði fakliga og námsfrøðiliga."



*Fundur um nýggja skúladepilin. Teir báðir dagligu toghaldararnir á stóru verkætlanini við Marknagil eru: Uttast til høgru Karl Jakob Ósá, verkætlanarleiðari á Landsverki, og Finn Nørkjær, arkitektur frá Bjarke Ingels Group. Hinir eru frá vinstru Suni Dalsgaard og Ole Jensen, arkitektar á Landsverki, og Svend Sivertsen, arkitekur á Fuglark.*

Mynd: Álvur Haraldsen

### Um arkitektin

Finn Nørkjær, arkitektur og projektleiðari á skúladeplinum, hevur arbeitt við einum ótali av byggiverkætlanum og fleiri av teimum størstu hjá BIG. Til dømis Vandkulturhuset, VM-Husene í Ørestaden og 8-Tallet. Til Føroya kom hann mestsum beinleiðis úr kinverska býnum, Shanghai, har hann stóð fyri bygginginI av Den Danske Pavillion. Hann hevur vunnið fleiri danskar og altjóða virðislønir fyri sín arkitektur.

**Status**
*Kunningarblað til politikarar, myndugleikar og onnur áhugaði*
Útgevari: Landsverk – september 2010
Lagt til rættis: Kunningin á Landsverki
Myndir: Bárður Eklund og egnar myndir

Eintøk av hesi útgávu kunnu fáast við at venda sær til:
Landsverk
Tinghúsvegur 5
FO-100 Tórshavn
tlf. 340800
kami@lv.fo · susanna@lv.fo · www.lv.fo